# Botnvarp



James Olsen, liðskipari, við manning

**Í vikuni fór Sjónvarp Føroya undir at framleiða tíggju útgávur av undirhaldssendingini "Botnurin" afturat teimum tólv, sum longu eru klárar at senda út. Sosialurin hugdi afturum leiktjøldini, meðan nýggju liðformenninir James og Lena kappaðust um stigini, og eftir senindinga royndu vit at koma á botn saman við vertunum**

BOTNURIN

*Orð:Ingrid Bjarnastein & Rúnar Reistrup*
*Myndir: Jens K. Vang*

– Buuuhhh, Åååhhh, Hahahaha!

– Hatta er gott, men royníð og flennið eitt lítið sindur harðari. Roynið aftur.

Rúni Kjær hevur eina umráðandi uppgávu undir framleiðsluni av nýggju føroysku undirhaldssendingini, sum verður send hvørt leygarkvøld komandi tíðina undir heitinum "Botnurin". Á borðinum framman fyri sær hevur hann skeltir við nøkrum sagnorðum í boðshátti. "Flenn!", "Klappa!" og "Jubla!" stendur á teimum skeltunum, sum oftast verða hildin upp í loft, nú Rúni Kjær roynir at hita áskoðarafjøldina upp, fimm minuttir áðrenn myndatólini verða tendrað og teir báðir Tróndur og Jens Tummas seta ferð á spurnarkappingina.

Ígjøgnum alla sendingina er Rúni tann, sum ræður fyri hvussu áskoðararnir ljóða.10. flokkurin, sum hesuferð situr á áskoðaraplássunum, er rættiliga dugnaligur til at akta skeltini, men Rúni Kjær fílist á desibelstøðið hjá ungu røddunum, sum sýnist at lækka sum sendingin líður.

## Uppgearaðir vertir

Tað gera røddirnar hjá vertunum hinvegin ikki. Eftir eina heldur stirvna byrjan, har teir seks luttakararnir í spurnarkappingi virka eitt sindur fjálturstungnir, kemur rættilig gongd á í seinnu helvt av sendingini, ikki minst takkað verið James Olsen og hansara lætta lyndi. James og Lena Andersen eru nýggju liðskipararnir í sendingini, eftir at Jenny Petersen og John Petersen hava staðið á odda fyri hvør sínum liði í teimum fyrstu tólv sendingunum.

At hetta er 18. ferðin sendingin verður tikin upp, sæst ikki aftur á vertunum. Teir eru fullir av orku og geara hvønn annan og luttakararnar upp. Onkuntíð hava teir hug at siga okkurt minni borðbart, men tað eydnast sum oftast produsaranum, Ingibjørg Jacobsen, at halda í oyruni á teimum, áðrenn teir fara útum mark.

– Tað er ringt at vita nær man skal tiga. Onkuntíð byrja vit uppá eina joke, men so verður rópt í oyrasniglinum, at vit skulu steðga. Hesaferð var tað til dømis hin um blondinuna, sum.... nei, lat meg einki siga, sum varð stegðað áðrenn Tróndur fekk fortalt hana lidna, hugleiðir annar av vertunum, Jens Tummas, eftir at sendingin er liðugt upptikin, og vit hava fingið teir undir átta eygu.

– Ja, tá tað koyrir væl og adrenalinið pumpar er tað skjótt at siga okkurt, sum man ikki burdi sagt, sigur hin uniformklæddi verturin, Tróndur Vatnhamar.




Rúni Kjær fær fólk at jubla



Upptøkuhølini ímynda ein kavbát. Edward Fuglø hevur staðið fyri pallsmíðinum

# Botnfiskar svara

*Hvør hevur tað stuttligari? Hyggjararnir ella tit?*

– Vit. Tað er sera stuttligt at gera sendingina, serliga tá tað gongur væl, og luttakararnir eru lívligir. Men eg vænti at hyggjararnir eisini hava tað stuttligt onkuntíð. Grundtankin við allari sendingini er faktiskt, at tá vit hava tað stuttligt, so hava hyggjararnir tað eisini stuttligt.

*Hvønn vendir sendingin seg til?*

– Hetta má sigast at vera ein sending fyri ung, ung fólk og annars øll við ungum sinni. Hetta er ikki humor á høgum intellektuellum stigi, og tað skal tað heldur ikki vera, og tí eru tað sjálvandi nøkur, ið kanska halda tað vera eitt sindur býtt.

*Hví er sendingin bygd upp sum ein spurnarkapping?*

– Tí fólk vilja hava kappingar. Nærum allar undirhaldssendingar eru kappingar av einum ella øðrum slag. Tað vísir seg at vera væl dámt at síggja fólk kappast um eitthvørt.

– Spurnarkappingin er okkara reyði tráður, sum vit fara frá við jøvnum millumbilum, men altíð kunnu venda aftur til. Men hyggur man eftir sendingini sum heild, so er spurnarkappingin bara ein lítil partur av henni.

*Hvat er tann torførasta avbjóðingin tit hava sett hvørjum øðrum?*

– Fyri mítt viðkomandi var tað tá Tróndur bað meg ringja til løgmansskrivstovuna við einari bumbuhóttan, og tá eg varð biðin um at strippa á Ellisheiminum kom eg eisini í eina svára støðu, sigur Jens Tummas.

– Eg fekk at vita at eg skuldi leypa á sjógv eftir einum hundraðkrónuseðli, sum Jens Tummas blakaði út.

*Hvat hava fólk sagt um sendingina?*

– Vit hava fingið verbalan bank frá onkrum, og onnur hava róst okkum nógv, so tað hevur verið ógvuliga ymiskt

– Ja, vit hava fingið onkran destruktivan kritik og nógvan konstruktivan kritik.



# Botnkanning

**Sosialurin hevur verið og loddað dýpið viðvíkjandi nýggju undirhaldssendingini "Botnurin", sum fór av bakkastokki í Sjónvarpi Føroya seinasta leygarkvøld, og sum verður send fyri aðru ferð í kvøld**



**Bárður Tindskarð,**
*22 ár, maskinsmiðjulærlingur, Tórshavn*

–Óluksáliga góð sending. Áhugaverd. Spurningarnir kundu verið eitt sindur betri. Vertirnir vóru fínir, og teir skulu heilt vist halda áfram soleiðis.



**Óli Viðoy,**
**29 ár, kokkur, Hoyvík**

–Eg rokni við, at hon verður frægari, tá vertirnir hava sæð seg sjálvar. Sendingin var ov illa skipað. Spurningarnir vóru á eini leið, men nú er tað soleiðis, at tá tú sært eina sending fyrstu ferð, so hevur tú ofta hug at leita eftir feilum. Eg vóni ikki, at teir hava tikið allar sendingarnar upp, tí tann fyrsta var ikki nóg góð. Onkur av liðskiparunum var tó eitt sindur keðiligur, men eg fari heilt vist at hyggja í kvøld, tí eg vænti hon verður frægari.



**Jórun Dánialsdóttir,**
*52 ár, bókhandlari, Tórshavn*

–Sendingin var ikki so galin. Gott at okkurt er fyri ungdómin. Hon er kanska ikki fyri blaðung, men eitt stað millum 20-40 ár. Tað, at teir báðir eru við, bendir á, at sendingin er fyri ungdóm. Tó var eitt sindur ov nógvur orðavavstur, og mátin tosað var uppá var eitt sindur óbeinleiðis. Tað var mestsum undirforstaðið millum ung, og tí giti eg, at nógv vaksin hava ikki skilt alt. Mær dámar serliga væl føroyskar sendingar og tí ætli eg mær at hyggja næstu ferð. Pallsmíðið var ógvuliga vakurt, og teir báðir vertirnir eru stak sjarmerandi.



**John Petersen,**
*29 ár, lærari og vertur í Botninum, Tórshavn*

–Tann fyrsta sendingin var ikki tann besta. Har koma nógvar betri.Tað var stuttligt at gera sendingina, men ógvuliga strævið. 5 - 6 tímar hvønn dag í eina viku. Man hevur jú eisini nógvar nervar í byrjanini, og tann fyrsta sendingin er merkt av tí. Eg havi ikki merkt so nógv til at eg havi verið við, uttan tað, at næmingarnir ganga og rópa botnurin eftir mær. Eg taki tað ikki so tungt, um sendingin ikki verður so væl móttikin - eg kann altíð venda aftur til fótbóltin.



**Maria Michelsen,**
*16 ár, praktikantur í Deres, Argir*

–Eg haldi, at sendingin var góð og undirhaldandi. Tað kundu verið fleiri avbjóðingar og liðskipararnir kundu eisini verið betri. Vertirnir vóru fínir, teir duga væl. Avbjóðingarnar vóru góðar, tí tað er eins og sjónvarp í útlondum.



**Niels Mortensen,**
*stjóri, Tórshavn*

–Eg haldi, at sendingin var góð og undirhaldandi. Spurningarnir vóru kanska eitt sindur ov tápuligir. Tað var týðuligt tá eina liðið bara fekk 0 stig í fyrsta umfari. Men generelt er hatta gott undirhald, lætt. Hatta er nakað nýtt og sendingin fer helst at koma fyri seg.